

**Óli Jacobsen**
*olijacobsen@post.olivant.fo*

at flyta heim til foreldrini at gera útstýr, men enn var eingin dagur ásettur.

## Ov ungur at giftast 22 ára gamal

Tað var eisini tað, at míni foreldur heilt vist ikki hildu tað vera hóskandi, at teirra sonur gifti seg í so ungum aldri. Eg hevði heldur einki sagt teimum um mínar ætlanir at giftast. Men tey máttu so rokna við, at hetta kundi koma uppá tal, tí vit høvdu havt ring uppi á í tvey ár.

Eg vitjaði Margrethu nakrar ferðir heima hjá foreldrunum inni í Heiðunum. Fyrstu ferð var eg eitt sindur stúrin um, hvussu hetta fór at rigga, men tað gekk heilt væl. Eg kundi beinanvegin merkja, hvussu góð Ellen Maria, vermamman, var við meg. Hon var eitt stórt menniskja, sum undir beskednum umstøðum hevði klárað at uppala ein stóran barnaflokk til at vera dugnalig og góð menniskju.

Hon var bóndadóttir av Skála og hevði frá ungdóminum lært nógv um húsarhald og matgerð.

Hon varð altíð biðin um at standa fyri brúdleypum sum høvuðskokkur og tað sama við barnadópi og konfirmatión.

Verfaðir, Hans Andreas, var sjómaður og kundi eins og sjómenn taka sín tørn, tá komið var heim av túri. Hann var ein flottur maður, ein rættur víkingur, høgur, stórlimaður við ljósum hári og gulligum fullskeggi. Hann var eitt slík mannfólk, sum eg haldi, at allar kvinnur kundu fallið fyri.

Tað ljóðaði, at vermóður hevði trupult við at stýra honum í teirra trúlovingardøgum. Men so hendi tað, at skipið, hann var við, gekk burtur undir Íslandi. Tá lovaði hann Várharra, at um hann varð bjargaður, so skuldi hann vera Ellen Mariu trúgvur og gifta seg við henni. Hann varð bjargaður, og stutt eftir at vera komin heim giftust tey bæði.

Margretha og eg skrivaðu nógv saman hesa tíðina. Men eitt bræv hevði tó eitt serligt innihald.

Margretha boðar frá, at nú er tíðin komin, har vit mugu seta brúdleypsdagin.

Eg mátti fyrst geva mínum foreldrum beskeð. Eg var so ungur, at eg mátti samb. galdandi hjúnarlagslóg hava játtan frá teimum at giftast.

Eg var eisini greiður yvir, at tað bar ikki til at fáa eini hús við teirri freist, vit høvdu. So eg mátti eisini fáa greiðu á, um eg kundi sleppa at búgva heima aftaná giftarmálið ella eg máttu leiga eina íbúð.

Eg hevði stóra virðing fyri mínum foreldrum og var ikki serliga errin at fortelja teimum, at eg skuldi giftast. Eg fortaldi tað fyrst fyri mammu, og roknaði so við, at hon fortaldi tað fyri pápa. Tað var eisini tað, sum hendi.

## Einki at bíða við

Mamma royndi at tosa uppundir, um eg ikki kundi bíða við at giftast, til eg var blivin nakað eldri. Men hetta kundi ikki koma uppá tal. Síðan royndi mamma at fáa meg við uppá, at eg eftir giftarmálið skuldu búgva í Ólastovu, meðan Margretha skuldi búgva heima hjá sínum foreldrum. Hon royndi eisini at fáa beiggja sín, sum var fýrmeistari á Borðuni, at sannføra meg um hetta hugskot.

Men eg avvísti fullkomiliga, at vit bæði ikki skuldu búgva saman. Eg hótti við, at sluppu vit ikki at búgva í Ólastovu fyrstu tíðina, so skuldu eingin kroysa var ov vánalig til okkum at leiga. Tá fall øll mótstøða burtur.

Tað merkiliga var, at pápi var ikki so nógv ímóti okkara giftarmáli, sum mamma var. Tá skilti eg ikki mammu, men seinni havi eg skilt hana betur. Tað var als ikki tað, at hon hevði nakað ímóti Margrethu, men tað var fólkatosið, sum hon ræddist. Hvat vildu fólk siga um, at sonur hennara mátti giftast so ungur.

Um hesa tíðina var ein danskur trúboðari í Havn. Hann ferðaðist nógv kring oyggjarnar, og hóast hann hevði konu og børn, varð sagt, at honum dámdi væl at hyggja eftir ungum gentum í bygdunum, hagar hann kom.

Hann plagdi eisini at vitja fólk í Havn, eisini kom hann inn til okkara. Tað var mest mammu, hann tosaði við, hetta var ikki nakað fyri pápa. Mær dámdi hann heldur ikki. Ein dagin eftir, at tað frættist í býnum, at "Kristian í Ólastovu nú skuldi giftast", var trúboðarin komin á vitjan. Hann segði við mammu, at hann helt meg vera alt ov ungan at giftast. Men hetta vildi mamma tó ikki góðtaka og segði við trúboðaran, at "Kristian hevur altíð verið so tíðliga mentur." Tá ið eg frætti hetta gjørdist eg í øðini. Eg skuldi seta handan mannin uppá pláss, hann skuldi helst ikki tosa um moral. Men mamma fekk sissað meg, hon hevði jú ikki hildið við honum. Men framvegis merkti eg á mammu, at hon var kedd um, hvat fólk tosaðu.

Umframt fólkatosið visti mamma frá egnum royndum, hvussu trupult tað var hjá ungum hjúnum at skulla liva saman við eldri fólki í eini lítlum húsum. Men hetta hugsaði eg ikki so nógv um. Vit høvdu ofta verið fleiri fólk í húsi. Nú vóru tað bert foreldrini og beiggi mín Martin. Johan, beiggi mín, var tá farin til Danmarkar at arbeiða.



*Tað var dómarin Hans Chr. Tygesen, sum fekk Kristian Djurhuus at koma á dómaraskrivstovuna. Her sæst Tygesen saman við konuni og børnunum, sum vórðu kallað Mutte, Manne og Bimbo.*



*Kristian Djurhuus tekur til marstalskonnartirnar, har manningin setti lívið í vága undir 1. heimsbardaga millum annað við at sigla við salti úr Miðalhavinum til Føroya.*



*Ein marstalskonnart fór á land í Norðradali og øll manningin doyði.*





*Hans Andreas og Ellen Maria vóru verforeldur hjá Kristian Djurhuus.*

## Margretha verður 80 ár

Tað kann verða nevnt, at nú fríggjadagin 8. apríl verður Ingibjørg, verdóttir Kristian Djurhuus, 80 ár. Hon var gift við Erling, sum var næstyngsti sonur Margrethu og Kristian. Ingibjørg verður at hitta í Sjónleikarhúsinum føðingardagin frá kl. 11

**Í komandi parti** verður Kristian giftur. Samstundis verður í nøkrum pørtum eisini greitt frá ættini hjá Margrethu